# Skúlasamstarv

## Eitt dømi um skúlaeindir

| Stað | Næm. |
|---|---|
| Kommunu | 573 |
| Eystursk | 537 |
| Hoyvík | 496 |
| Runavík | 458 |
| Venjingar | 451 |
| Klaksvík | 405 |
| Klaksvík | 342 |
| Argir | 333 |
| Fuglafj | 328 |
| Skt.Fr | 285 |
| Tvøroyri | 279 |
| Giljanes | 255 |
| **Vágur** | **228** |
| Vestmanna | 206 |
| Strendur | 203 |
| Torfir | 183 |
| Kollafjarðar skúli | 146 |
| Sørvágur | 137 |
| **Meginsk** | **119** |
| Adventistaskúlin | 116 |
| Hvalbiar Skúli | 100 |
| **Oyrabakki** | **96** |
| 22 skúlar | **6276** |
| | |
| Gøtu | 125 |
| Leirvík | 94 |
| Eiði | 73 |
| Skála | 70 |
| **Norðskála/Oyri** | **65** |
| **Kvívík** | **54** |
| Velbastaður | 52 |
| Viðareiði | 50 |
| **Hvalvík** | **43** |
| **Hósvík** | **41** |
| Fossánes | 41 |
| **Sandur** | **40** |
| **Skopun** | **33** |
| **Porkeri** | **29** |
| Nólsoy | 29 |
| Kaldbak | 28 |
| **Haldórsvík** | **20** |
| **Sumba** | **14** |
| Oyndafjørður | 11 |
| **Hov** | **4** |
| **Húsavík/Dalur** | **3** |
| 21 skúlar | **919** |
| | |
| **Skálavík** | **13** |
| Fámjin | 8 |
| Húsar/Syðrad | 8 |
| Miklad/Trøllanes | 7 |
| **Funningsfjørður** | **6** |
| Kunoy | 6 |
| **Tjørnuvík** | **6** |
| **Leyna/Vála skúli** | **5** |
| Haraldsund | 4 |
| **Gjógv** | **3** |
| Sandvík | 3 |
| Skúvoy | 2 |
| Hests skúli | 2 |
| Mykinesar skúli | 2 |
| **Funningur** | **1** |
| 15 skúlar | **76** |
| | |
| | **7,271** |




**Yvirlit yvir skúlarnar í Føroyum, býttir upp eftir støðd**

*Talvurnar eru frá einari framløgu, sum Magnus Tausen hevði fyri Kommunusamskipan Føroya herfyri. Næmingatølini kunnu verða broytt nakað síðan, men tey vísa eina ábending.*

*Talvan vinstrumegin er eitt dømi um, at líttu økini samstarva.*
*Í talvuni á høgru síðu siggja vit dømi um, at næstan allir smáu skúlarnir eru lagdir saman við stórum.*
*Í talvunum verða skúlarnir býttur sundur í stórar skúlar við skúlastjórum, teir sum hava fyrstulærarar og teir smæstu, sum hava einalæraraskipan.*
*Summar bygdir liggja soleiðis fyri, at børn kunnu ikki flyta millum vegna vánaligt ferðasamband*

### Føroya Lærarafelag mælir ikki til, at skúlar verða niðurlagdir, men at teir umleið 56 skúlarnir verða umskipaðir í størri samstarvseindir, við felags lærаratoymi, bygningum og næmingum, sum hoyra til økið. – Á hendan hátt fáa vit meira burturúr hvørjum læraratíma, staðfestir Magnus Tausen, formaður

**SKÚLAMÁL**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Skulu fleiri børn koyra við bussi í og úr skúla hvønn dag? Ella skulu lærarar koyra millum bygdirnar og undirvísa? Ella skulu bæði lærarar og næmingar flyta seg í annað stað av og á? Hesir eru bert nakrir av spurningunum, sum verða settir í hesum døgum. Tí hvat ætla vit við føroyska fólkaskúlanum, og hvussu gagnnýta vit lærarakreftirnar betur? Hesar spurningar verða vendir í samrøðu við formannin í Føroya Lærarafelag.

- Vit mæla ikki til, at skúlar verða niðurlagdir. Men at teir umleið 56 skúlarnir verða umskipaðir í størri samstarvseindir, við felags læraratoymi, bygningum og næmingum, sum hoyra til økið. Á hendan hátt fáa vit meira burturúr hvørjum læraratíma, staðfestir Magnus Tausen.

Í sama andadrátti leggur hann dent á, at her er alneyðugt at varðveita verandi orku og pengar innan fyri skipanina, fyri at kunna geva eitt betri tilboð.

– Ynskja vit at tryggja eitt dygdargott, fjølbroytt og nútímans skúlatilboð noyðast skúlarnir at samstarva meira og ikki seta smáu skúlarnar upp ímóti teimum størru. Tað snýr seg um at hyggja eftir samlaða skúlaverkinum undir einum, sigur Magnus Tausen. Hann ímyndar sær, at tað ber til at flyta bæði næmingar, flokkar og lærarar ímillum, tá tørvur er á tí. Og at smáu bygdaskúlarnir til dømis kunnu verða nýttir til serlig námsfrøðilig ednamál, til dømis til næmingar við serligum tørvi, sum ongan góðan eiga í dag, til ávísar verkætlanir ella lærugreinir.

– Tað skal helst eisini vera soleiðis, at foreldur og lærarar kunnu velja ein lítlan skúla, tí hann veitir eitt námsfrøðiligt tilboð, sum er serligt og hóskar júst til viðkomandi. Hetta snýr seg ikki um einsrætting, men